# Bakaríið hjá Sveini – er bara best

**Sveinur Thomasen lærdi og arbeiddi hjá Waldemar Simonsen í Sørvági í 11 ár. Síðani byrjaði hann sjálvur í Miðvági í apríl 2000. Arbeiðsdagurin hjá honum byrjar, kl 00.30, tá byrjar hann at gera klárt til dagsins arbeiði**

BAKARI

*Asger K Eið Jensen*



*Sveinur vigar mjøl av til dagsins breyð*

*Mynd: Snorri Brend*

**Miðvágur:** Sveinur hevur bert bakarí – t.v.s. ikki sølu av bakaravørum, hóast hann bakar bæði rugbreyð, fransbreyð og vanligar bakaravørur, so sum køkur, wienerbreyð o.s.fr.

– Tað er ov bundið at hava eina sølubúð. So tað havi eg aldrin hugsað um, sigur Sveinur.

At hann byrjaði fyri seg sjálvan var tí, hann hevði eitt ynski um at taka við avbjóðingum.

– Mær hevur altíð dámt væl at baka, og tað er nú mítt lívsstarv.

Hóast man er bakari, so er man sosialur allíkavæl. Tað er bara ein spurningur um at leggja arbieðið til rættis. Hann kemur eisini í samband við kundarnar, tí hann sjálvur koyrir vørurnar út til handlarnar í oynni.

– Jú, hetta er eitt positivt arbeiði, sigur Sveinur.

Sveinur selir til fýra handlar í Vágoynni, umframt Hotel Vágar og ymisk skip. Nevnast skal, at breyðið sum ferðafólkini fáa umborð á flogførunum hjá Atlantic Airways eru frá Sveini.

Ikki er gjørligt hjá øðrum føroyingum at royna hansara bakaravørur, tí tær verða einans seldar í Vágoynni.

Arbeiðsdagurin byrjar kl. 00:30 og er so liðugur kl. umleið 10:00

**Ein arbeiðsdagur:**

- 00:30 Fer til arbeiðis og ger deiggið klárt
- 03:00 Fyrstu breyðini fara í ovnin
- 05:00 Pakkarin kemur til arbeiðis
- 06:30 Fyrsti handilsmaðurin avheintar síni breyð
- 08:00 Bilurin pakkaður og hann fer runt oynna við breyðum sínum
- 09:00 Við hús aftur
- 10:00 Fer til songar
- 16:00 Fer aftur á føtur

– Hetta er ein rútma, sum ein bara má venja seg til. Og fyri meg hevur tað ikki verið nakar trupulleiki, sigur Sveinur.

Ein vansi við arbeiðinum er frítíðin, og serliga summarfrítíðin. Hann er jú einasti bakarin á fyritøkuni, og kann tí ikki halda frí og bara steingja bakaríið. Kona hansara Esther ordnar rokniskapin á fyritøkuni. Hann hevur eisini ein pakkara hjá sær, sum bæði sker breyðið og pakkar tað.

Hinvegin so leggur Sveinur dent á, at hann bakar ikki sunnudagar!

Hann er kortini av og á á messum í Danmark, og tá hevur hann gjørt tað so, at kundarnr í Vágum fáa breyðið frá bakaranum í Vestmanna.




SKRIVARI OG DAGLIGUR SAMSKIPARI

Spennandi og avbjóðandi starv sum skrivari og dagligur samskipari í LISA – Listafólkasambandi Føroya.
Søkt verður eftir fólki til at hava um hond dagliga virksemið í LISA at byrja 1. mars, ella skjótast til ber.
Starvið er 30 tímar um vikuna og er treytað av játtan frá Mentamálaráðnum. Løn sambært avvarðandi yrkisfelag.

VIRKSEMIÐ FEVNIR UM:
At leggja til rættis virksemið hjá LISA
At skráseta viðurskiftini hjá teimum 9 limafeløgunum.
At leggja til rættis fundir.
At fylgja øllum málum upp, sum starvsnevndin og umboðsráðið hava samtykt.

FØRLEIKAKRØV:
Tann, ið søkir skal vera køn/ur í føroyskum, øðrum norðurlendskum málum og enskum.
Skal hava teldukoyrikort.
Skal hava kunnleika um at skriva umsóknir.
Skal hava førleika at halda roknskap.

Umsóknir skulu sendast til LISA, postsmoga 324, FO-100 Tórshavn, og vera okkum í hendi í seinasta lagi 01.03.06

LISA • Postsmoga 324 • FO-100 Tórshavn

REPROZ


# Børnini í Bø



*Gunvør syngur »Tummilfingur« saman við børnunum í barnagarðinum í Bø*

*Mynd: Snorri Brend*

**Mikidagin í farnu viku vitjaðu vit Gunnvør Niclasen og dóttrina Rannvá í Løðini. Tær starvast báðar barnagarðinum í Bø**

BARNAGARÐUR

*Anna Kathrina G. Mortensen (praktikantur)*

Gamli skúlin í Bø, er í dag nýttur til dagrøkt.

Hvønn dag eru vanliga eru 12 børn í ansing har, men tá vit vóru á vitjan mikudagin í farnu viku, vóru bert sjey børn at hitta.

Í mars mánaði koma tvey børn afturat, so tá verða tey 14 í tali.

Um veðrið er gott, so spæla tey úti, og onkuntíð fara tey oman á sandin. Tey vitja eisini ymsastaðni m. a. hjá bóndunum ella fara tey av bygdini, til Miðvágs og Vatnsoyrar, tí har er barnavinarligt umhvørvi og góð spælipláss til børnini á báðum støðum.

Flogvøllurin liggur eisini tætt við Bø, so um tað liggur væl fyri, fara tey á vitjan har og fáa sær okkurt leskiligt til matna.

Í Havn hava tey eisni verið, tá fóru tey í Burger King at eta.

Henda mikumorgun tá vit vóru á vitjan, sótu børnini og hugnaðu sær saman, nøkur teknaðu og onnur spældu á madrassum. Av tíð at veðrið var so ringt henda dagin, høvdu tey bert verið inni.

Til seinast sluppu vit at hoyra børnini syngja fyri okkum, og ímeðan spældi Gunnvør guittara.